**Hvalvíkar missiónshús**
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl.14.30 og møti við Regin Høgnisen og fleiri kl. 18. Øll eru vælkomin

**Eydnan Oyrarbakki**
Møti í Eydnuni sunnukvøldið kl. 18, Solveig Joensen og Alica Andreasen tala. Sonlis, Tummas Símin og 590716 5907 Pól Frits syngja. Øll eru hjartaliga vælkomin til møtini.

**Missiónshúsið á Toftum**
Eldrasamkoman verður fríggjadagin 11. apríl kl. 16. Øll eru vælkomin!

**Bønhúsið, Søldarfjørður**
Sunnudagin er eingin sunnudagsskúli og lestur. Familiumøti verður kl. 17 við Henning Bøgesvang. Hvør familia hevur ein bakka við breyði til hugnaløtu aftaná.

**Meinigheitshúsið á Skála**
Sunnudagin kl. 13.30 er sunnudagsskúli og møti kl 19. Øll eru vælkomin.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Helga Abrahamsen. Sunnudagin kl. 17, Møti við Hjørdis H. Petersen, sangur við Rebekku og Nat. Barnamøti kl. 17. Vælkomin í Kelduna. www.keldan.fo

**Aglow Eysturoy**
Møti fyri gentur og kvinnur verður í Nebo á Toftum leygarkvøldið 12. apríl kl. 19.30. Talari: Rannvá Royðutoft. Kristina Hansen leiður lovsong. Byrjað verður við drekkamunni. Verið hjartaliga vælkomnar.

**Missiónshúsið á Selatrað**
Sunnudagin kl. 18 Møti, Sylverius Jacobsen og Henry Jarnskorð tala, Taborkórið úr Fuglafirði syngur.

**Tabor, Toftir**
Ungdómsmøti verður leygarkvøldið kl. 20. Evni: Syndarins vinur. Talari: Heini Kristiansen. Hjartaliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Rituvík**
Leygarkvøldið kl. 20 Ungdómsmøti, opið hús. Sunnudagin kl. 16 Familjumøti.

**Missiónshúsið í Gøtu**
Møtið verður í kirkjukjallaranum sunnukvøldið kl. 18. Arne Vatnhamar úr Leirvík greiðir frá ungum árum á sjónum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Kambsdalur, Handilskúlin**
Sunnumorgun kl. 11 Breyðbróting. Týskvøld kl. 20 Bønar- og uppbyggingarmøti.

**Missiónshúsið í Leirvík**
Sunnudagin kl 14.30 verður sunnudagsskúli, kl. 18 verður møti - evni: Cambodja v/Vagn Foldbo og kl 21 verður ungdómsmøti - evni: Ódnarnáttin við Thor Senty og aðrar hendingar. v/ Alfred Eliasen. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Getsemane, Stangaskákið 1**
Fríggjadagin kl. 20.30 møti. Poul Nicolai Steinberg talar Leygardagin kl. 10 morgunbøn. Sunnudagin kl. 18 møti v/ luttøku frá Lívsins Orð. Barnamøti er samstundis Hvønn gerandismorgun kl. 6.15 er morgunbøn.

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøld kl. 18 møti.

**KFUM & K Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14.00 Sunnudagsskúli, kl. 17.30 Bønarløta kl.18.00 Møti við Ólavur í Mittúni. Streingjakórið syngur Innsavnan til húsið. kl. 21.00 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 17.30 bøn-& lovsangur. Kl. 18 møti. Hjartaliga vælkomin.

**Betania, Skopun**
Fríggjakvøldið kl. 19 Sangvenjing. Leygardagin kl. 14 Barnamøti. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti v/ Raul Gustavsson Sunnudagin Møti kl. 18. Týsdagin Ungdómurin kemur saman kl. 19. Mikudagin Møti kl. 20 v/ Team frá levende Ord.

**Sion á Sandi**
Evangeliskir fundir verða í Sion á Sandi leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 19. Talari Poul Færø. Harmoniku tónleikarar luttaka.

**Missiónsvika í Bønhúsinum í Øravík**
Fríggjadag kl. 20 Símun Jacobsen prestur talar. Leygardag kl. 20 Menn av Glyvrum tala og syngja. Innsavnan til Heimamissiónina. Drekka aftaná. Sunnudag kl. 18 Jógvan Højgaard trúboðari talar. Kórið í Porkeri syngur. Drekka aftaná.

**Salem Tvøroyri**
Á ungdómsmøtinum fríggjakvøldið 11. apríl kl. 21 vitjar: Allan Conrad frá Mission Aviation Fellowship (MAF). Hetta er ein felagsskapur, ið fleiri kenna, sum flýgur fyri ymiskar trúboðarafelagsskapir. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Meinigheitshúsið, Vágur**
Sunnudagin 13. apríl: kl. 13.30 Sunnudagsskúli Einki møti verður orsakað av møtirøð í Øravík.

**Sion Vágur**
Møtir verða tann 13. apr. kl. 11 og kl. 18, David Bech talar. Mánakvøldið tann 14. apr. verður bønarmøti kl. 20.

**Evangel. fundur í DK**
***Esbjerg:*** fríggjakvøldið 11. apríl kl. 19.30 verður evangel. fundur í Mølleparken Spangsbergs møllevej 16. ***Sønderborg:*** leygarkvøldið kl. 19 verður evangel. fundur í Skolehjemmet Sønderlandevej 28. ***Vejle:*** sunnukvøldið kl. 17 verður evangel. fundur í Staldgårdsgade 4. Øll eru hjartaliga vælkomin. Talarar eru Levi Joensen og aðrir. Hans Jákup á Lava og aðrir syngja. Ein góður kaffimuður eftir allar fundirnar.

**Felagið Tórshavn, Gongutúrur**
Farið verður til Skarið undir Nøvini - Skálafjall. Túrurin er miðal lættur og gingið verður 3-4 tímar. Farið verður av Kunningarstovuni í Havn kl. 10:00. Minst til at hava heit og góð gonguklæðir og matpakka við. Tilmelding á Kunningarstovuni ella tlf. 302425.

**Frá Eysturoyar gongufelag**
Spákingartúrur verður út á Pollin í Saksun sunnudagin 13. apríl. Vit møtast kl. 14 í Saksun.

**Tilhaldið í Tórsgøtu 21**
*Opið er mánadag til fríggjadag kl. 10.00 – 17.00*
*Teldupostur: tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks*
***Mánadagur***
10.00 – 10.30 Fimleikur Grete Ellingsgaard
10.00 – 12.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Marita
14.00 – 16.00 Ymiskt handarbeiði - Signy og Marita
14.00 - 17.00 Kortspæl o.o. spøl
Kunnigafólk til ferðafólkini, ið koma við ferðamannaskipunum í juni – sept. Mðr. Meiri fast at vita á tlf. 215098/316491, Katrina í Geil, verkætlanarskipari
***Týsdagur***
09.00 - 10.30 Tekstviðgerð (lítið royndir brúkarar) Páll Poulsen
10.30 – 12.00 Tekstviðgerð (royndir brúkarar) - Páll Poulsen
10.00 – 13.00 Heilsugóður kostur - Anne Grethe Harlou
10.00 – 11.30 Vit syngja - Óli Vang
Øll eru hjartaliga vælkomin
15.00 Altjóða viðurskifti Bjørn Kunoy, løgfrøðingur o.m.a. serfrøðingur í altjóða rætti
Øll eru hjartaliga vælkomin
***Mikudagur***
09.00 - 12.00 Maskinbinding v/Maritu Guttesen
10.00 - 12.00 Veving v/ Joanu Bjarnastein
10.00 - 12.00 Bindiklubbur
Øll eru hjartaliga vælkomin
10.00 - 13.00 Heilsugóður kostur v/ Annu Grethu Harlou
15.00 Vitja útvarpshúsið.
***Hittast uttanfyri útvarpshúsið Fótfólkið hittast í Tilhaldinum kl. 14.30***
Randi/Elisabeth, fysioperapeutar
***Hósdagur***
10.00 – 10.30 Fimleikur v / Grete Ellingsgaard
11.00 Lesibólkurin: Vit lesa: »Tema við slankum« Sólrun Michelsen
Hittast hósdagin 24. apríl
14.00 – 16.00 Boccia í kjallaranum - Alma Poulsen
15.00 DVD filmur um Einu Cederblom í stovuni
***Nýtt tiltak og øll eru hjartaliga vælkomin við filmshugskotum***
***Fríggjadagur***
Dýri biðidagur STONGT
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv.*
*Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
hevur opið mánadag og týsdag frá kl. 13-17 og hósdag frá kl. 10-17.

**Dagtilhaldið í Gøtubrá tlf 441662.**
Opið týsdag og hósdag kl. 15-18.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Dagtilhaldið Blákollan á Oyri og er fyri allar eldri í Sunda Kommunu. Opið er hvønn týsdag og hósdag frá kl. 14.00 til 18.00. Ymiskt ítriv, smíð og teldufrálæra v.m.

**Dagtilhaldið í Luffustovu**
tlf. 737795. Opið er týsdag, mikudag og hósdag, kl. 15 til 18. Øll eldri eru vælkomin.

**Dagtilhaldið Fløvi á Glyvrum**
Í Kvinnufelagshúsinum á Glyvrum tlf. 448279.
***Opið mánadag til fríggjadag frá kl. 15.00 til 18.00. Allir pensionistar hjartaliga vælkomnir.***
*Hvønn dag er ein góður drekkamuður at fáa. Bløðini eru altíð til taks. Somuleiðis kort og spøl. Ver vælkomin at hava títt egna handarbeiði við. Andakt verður lisin hvønn dag.*

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
hevur opið mánadag og mikudag frá kl 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Eisini eru bløðini til taks.
***Mánadagin 14. apríl***
Felags døgurði kl. 14.00. Neyðugt er at melda seg til á tlf. Innan sunnukvøldið. Øll eru hjartaliga vælkomin.
***Mikudagin 16. apríl***
Anna Maria Joensen, fysioterapeutur, heldur fyrilestur um týdningin av rørslu at fyribyrgja beinbroyskni og beinbrot.

**Eldrafelagið Kumlá á Skála**
hevur hugnakvøld 15.4. kl. 19, har hjúnini Bøgesvang luttaka.

**Frá Dagtilhaldinum á Strondum**
Vit hava opið týsdag og hósdag millum kl. 15 og 18, vit eru byrjaði aftur.

**Tilhaldið á Toftum, tlf 448690**
Opið er týsdag, mikudag og hósdag kl 15 - 18.

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
Teldupostur: dagtilhaldid@post.olivant.fo
Opið er:
Mánadag og Mikudag kl. 13.30 – 17.30
Týsdag og Hósdag kl. 09.30 – 17.30

**Silvurbrúdleyp**
Mikudagin 14. mai 2008 hava Dorit og Kjartan S. Jensen, Oyri, silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin í Eydnuni á Oyrarbakka leygardagin 17. mai kl. 18.30. Tey, ið ynskja at halda dagin saman við okkum verða biðin at siga frá í seinasta lagi 4. mai á tlf. 422283 ella 224605.

**Silvurbrúdleyp**
Týsdagin 29. apríl 2008 hava Bodil og Christian Christiansen, Kollafjørður, silvurbrúdleyp. Veitslan verður hildin í bygdarhúsinum í Hósvík fríggjadagin 2. mai kl. 19.00. Øll eru hjartaliga vælkomin. Tey sum vilja gleða tey við at koma, verða biðin um vinarliga at siga frá í seinasta lagi 16. apríl, á tlf.nr. 421585, 286010 ella 277685.

**Brúdleyp**
3. mai kl. 15, giftast í Eiðis kirkju, Olivia Johansen og Hallur Hansen. eftir vígsluna verður døgurði í Bygdarhúsinum í Leirvík kl. 18.30. Øll eru vælkomin við at tekna seg á tlf. 423133, á olivia.johansen@hotmail.com ella á hallurhansen@email.fo innan 15.apríl.

31. mai kl.14.00 giftast í Eiðis kirkju Vilbjørg Maria Olsen og Eyðfinn Davidsen. Eftir víglsuna verður døgurði í Bygdarhúsinum í Leirvík kl 18.30. Øll eru hjartaliga vælkomin at tekna seg á tlf. 423237 ella á vilbjorg@kallnet. fo innan 17. mai.

**Konfirmantar í Viðareiðis kirkju 3. sunnudag eftir páskir.**
Fanný Gram Høgnesen
Jógvan Poulsen - bæði av Viðareiði.

**Konfirmantur í Haslev kirkju, leygardagin tann 12. apríl 2008.**
Ásla Húsgarð, Elmeparken 13, 4690 Haslev.

**Konfirmatión í DK**
Sunnudagin 13. apríl kl. 11 verður Leo Johannesen Mohr, sonur Oddvør Johannesen Mohr og Bjarna Mohr, fermdur í Nørre Tranders-kirkjuni í Aalborg. Leo býr á Ribevej 40, 1, 9220 Aalborg øst.

**Konfirmatión**
Daniel Eystberg Sørensen (sonur Barbaru Eystberg Sørensen úr Húsavík) verður fermdur í Filips Kirke, KBH.S dýra biðudag 18. apríl kl. 12.00. Døgurði er fyri innbodnum í Føringahúsinum á Vesterbrogade 18. Kl. 19.00 er vælkomst. Tey sum ynskja at gleða Daniel við einari heilsu eru vælkomin at senda hana til Backersvej 92, 2 tv. Dk-2300 KBH. S.



Leygardagin 3. mai giftast Fríðgerð Olsen og Rani í Líð. Vígslan verður í Hósvíkar kirkju kl. 15.00. Veitslan verður í HB-húsinum í Havn kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin at tekna seg á tlf. 509800 0g 503838, áðrenn 19. apríl.

# Brúðarmyndir



*Hjartaliga takka vit øllum, sum á ymiskan hátt gleddu okkum á hjúnabandsdegi okkara 29. desember 2007.*
***Turið og Jón***